norden

# Norðurlandahúsið í Føroyum

## SUMMARFRAMSÝNINGIN 2007

### Í Klingruni, Dansistovuni og í Forhøllini

**17 Norðurlendsk listafólk viðgera náttúruna**

Astrid Andreasen (FO) Fríða Brekku (FO) Edward Fuglø (FO)
Julie Edel Hardenberg (GL) Zacharias Heinesen (FO) Hansina Iversen (FO)
Rannvá Kunoy (FO) John Kørner (DK) Oggi Lamhauge (FO)
Anna Líndal (IS) Hans Pauli Olsen (FO) Torbjørn Olsen (FO)
Brandur Patursson (FO) Fredrik Raddum (NO) Jonas Hvid Søndergaard (DK)
Kassandra Wellendorf (DK) & Simon Løvind (DK) Kathrine Ærtebjerg (DK)
1. august er seinasti dagur framsýningin er opin.

**Hátíðarhald í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni í Høllini**
**Ólavsøkudag 29. juli kl. 15.00**

**Húsið er opið hesar tíðir um Ólavsøkuna:**
Ólavsøkuaftan 28. Juli 14-20
Ólavsøkudag 29. Juli 14-20
Mánadag 30. Juli 14-18

**Í Borðkrókinum er høvið at keypa breyð við føroyskum og útlendskum viðskera, køkur, kaffi, te, øl, sodavatn, vín o.a.**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
Tlf. 351351 · Fax 351350 · nlh@nlh.fo · www.nlh.fo

**Mentamálaráðið**
Fólkaskúladeildin

## Einalærari í Mikladals/Trøllanes Skúla

Tíðaravmarkað starv sum einalærari í Mikladals/Trøllanes skúla verður lýst leyst til setanar skúlaárið 2007/08.

Í Mikladals/Trøllanes skúla eru 7 næmingar í 1. – 7. flokki.

**Um starvið**
Einalærarin undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av skúlanum.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving. Um eingin lærari søkir starvið, verður fólk, ið ikki hevur fólkaskúlalærarútbúgving, sett í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Mikladals/Trøllanes Skúla.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2 – 30.2.

Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 10. august 2007 kl. 13.00.

Umsóknin verður stílað til
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við T-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, tlf. 355050.

# Skrivstovu-lærlingur

Søkt verður eftir einum lærlingi til skrivstovu okkara í Tórshavn. Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, íroknað telefon- og postavgreiðslu, bræva- og teldubrævasamskifti, heimasíðurøkt, journalisering og bókhald.

Umsøkjarar skulu helst hava góðan málsligan og tøkniligan førleika og HH-prógv ella líkn. Til tann rætta ella ta røttu kunnu vit bjóða eitt gott, fjølbroytt og altjóða læurpláss innan skrivstovuyrkið.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi fríggjadagin 10. august 2007 kl 15.00 og skulu stílast til oe@simprentis.com ella:

Simprentis P/F
Tórsgøta 16
Postboks 195
110 Tórshavn

Simprentis veitir útbúgving til fólk innan oljuvinnuna grundað á simuleringar, sum felagið sjálvt mennir. Grundhugsanin er, at fólk læra best, tá tey fáa roynt seg og hava tað stuttligt. Skeið verða veitt um allan heim, og átta starvsfólk eru á skrivstovunum í Tórshavn, Aberdeen og Stavanger

SIMPRENTIS
PUTTING ENERGY INTO LEARNING




## Lærari til Hovs skúla

Søkt verður eftir lærara til umleið 6-8 avlopstímar um vikuna fyri skúlaárið 2007-08.

Umsóknir skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 10. august og skulu sendast til Óla Johannesen, Sjógøta 118, 800 Tvøroyri.

Meira fæst at vita frá skúlaleiðaranum Óla Johannesen, telefon 272647.

Í Hovs skúla eru 4 næmingar, harav 2 í 4. flokki, 1 í ávíkavist 6. og 7. flokki.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**HOVS SKÚLI**

veitst tú ikki tað?

Sosialurin

Tørvar tær timburmann?

**Ring á tlf. 21 93 18**

**J.T.D. SMÍÐ**